# Stásiligt savn mitt í býnum

**Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn heldur til í stásiligu Doktarahúsunum frá 1852 og inni eru fleiri enn 800 gamlir lutir og fleiri enn 1100 søguligar myndir, umframt at húsini eru søga í sjálvum sær, og á jóansøku er opið hús og húsini eisini karmur um eina listaframsýning**

VARÐVEITING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Virkni eldri harrin er eisini eldsálin aftanfyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. Fegin vísir Einar Larsen stásiligu Doktarahúsini fram. Tey eru sett í stand og standa nærum sum fyrsta dagin. Húsini eru frá 1852 og vórðu bygd, tá Nopoleon Nolsøe verð settur lækni í Suðuroynni, tí læknatrot var í oynni tá*

*Myndir: Dagfinn Olsen*

Einar Larsen er kent andlit á Tvøroyri og í Suðuroynni. Virkni eldri harrin er eisini eldsálin aftanfyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

Fegin vísir Einar stásiligu Doktarahúsini fram. Tey eru sett í stand og standa nærum sum fyrsta dagin. Einar greiðir frá, at húsini eru frá 1852 og vórðu bygd, tá Napoleon Nolsøe verð settur lækni í Suðuroynni, tí læknatrot var í oynni tá. Hann fekk pening frá danska statinum at byggja húsini fyri. Napoleon Nolsøe var lækni í nøkur ár, men eftir hann vóru danskir læknar, til Knút Nygaard kom í 1934. Amboðini hjá Nygaard eru í dag at síggja í húsunum og tað er forvitnisligt at síggja m.a. tilgjørd træbein, ið óivað eru tilevnað av lokalfólki, ið hava verið fitt í hondunum.

## Viðtaluhøli í oynni

Húsini vórðu bygd sum doktarahús, men donsku læknarnir vóru ikki fegnir um, at sjúklingarnir skuldu inn í stovur teirra, so í 1881 gevur danski staturin loyvi til, at bygt verður uppí húsini.

Viðtaluhøli og bíðirúm verður gjørt og ein leyslig meting er, at hetta snýr seg um einar 15 fermetrar.

- Hetta er óivað fyrsta viðtaluhøli í Suðuroynni og í bíðirúminum er bonkur til tvey fólk, greiður Einar Larsen frá.

## Nógv at síggja

Umfamt, at húsini í sjálvum sær eru søgulig, so er undrunarvert, so nógv sum tað hevur eydnast at savnað saman av lutum, ið lýsa farnar dagar.

Fleiri enn 800 lutir eru inni. Í kjallaranum herbergar felagið fleiri gomlum motorum og hevur eisini fingið fatur á gamlari kirkjuurgu av Tvøroyri, sum annars hevur verið nýtt á Giljanesi, men sum nú á ellisárum er komin aftur á Tvøroyri.

Tann eini stásiligi motorurin er av gamlu telegrafstøðini á Tvøroyri og at síggja slíkan gamlan motor í góðum standi, er nærum sum at skoða eitt listarverk, hvørt ein so hevur skil uppá motorar, ella ikki.

## Elsta skrivimaskinan

Mangt forvitnisligt er at síggja, millum annað ein serstøk skrivimaskina, ið kanska er millum tær elstu í landinum. Einar heldur hana vera eini 90 ár og hon sær ikki út sum skrivimaskinur flestar.

Við einum pinni peikar ein á bókstavin, ið skal fellast á pappírið, og so trýstur ein aðrastaðni, so stavurin smellur á pappírið. Høvi er at royna maskinuna, sum virkar sum fyrsta dagin.

- Umframt eini 800 lutir, so eru eisini eini 1100 søguligar fotomyndir og nógvar av hesum eru klárar til framsýning. Vit arbeiða við at fyrireika eina stóra framsýning, ið verður í skúlanum á páskum komandi ár, sigur Einar Larsen.



*Amboðini hjá Nygaard lækna eru í dag at síggja í húsunum og tað er forvitnisligt at síggja m.a. tilgjørd træbein, ið óivað eru tilevnað av lokalfólki, ið hava verið fitt í hondunum.*

## Frá Løbners tíð

Gamalt innbúgv er eisini í húsunum og er sum ein náttúrligur partur av einu stovuni.

Hetta eru borð, stólar og sofur frá Kaptein Løbners tíð.

- Løbner var skipari hjá Mortensens monnunum, greiðir Einar frá, og kemur skjótt við eini síðusøgu um, at tá kongalig vitjan hevur verið á Tvøroyri, so hava nakrir av hesum gomlu, stásiligu stólunum eisini verið nýttir.

Gomlu Doktarahúsini eru opin á jóansøku, leygardag og sunnudag frá klokkan 14 til 20, og umframt alt tað gamla, so ber eisini til at síggja eina listaframsýning í húsunum, tí Aggi Ásgeirsdóttir og Vigdis Sigmundsdóttir sýna list fram í húsunum.



*Hesin stásiligi mortorurin er av gamlu telegrafstøðini á Tvøroyri og at síggja slíkan gamlan motor í góðum standi, er nærum sum at skoða eitt listarverk, hvørt ein so hevur skil uppá motorar, ella ikki.*



*Mangt forvitnisligt er at síggja, millum annað ein serstøk skrivimaskina, ið kanska er millum tær elstu í landinum. Einar heldur hana vera eini 90 ár og hon sær ikki út sum skrivimaskinur flestar. Við einum pinni peikar ein á bókstavin, ið skal fellast á pappírið, og so trýstur ein aðrastaðni, so stavurin smellur á pappírið. Høvi er at royna maskinuna, sum virkar sum fyrsta dagin.*